# Vilt tú við á myndina?




SENDISTOVAN

Vit sóknast eftir einum sølufólki, ið skilir týdningin av at geva kundum okkara bestu tænastuna, eitt gott upplivilsi og at vera partur av drívmegini, ið merkir virkna liðið í Expert.

Expert í SMS er Føroya besti undirhaldshandil, við øllum tí nýggjasta innan tøkni og undirhald.

**Vit vænta, at:**

- tú ert fyrikomandi og setur kundatænastu hægst,
- tú ert ágrýtin,
- tú ert til reiðar at taka eyka tøk, tá hetta krevst,
- tú ert opin og áhugað/ur í øllum tí nýggja, ið rørist innan tøkni og undirhald.

**Vit kunnu bjóða tær:**

- eitt spennandi starv í einari ferðmiklari vinnu, sum altíð er merkt av menning og nýggjari tøkni,
- at vera partur av einum ungum og virknum starvsliði, ið altíð skal menna okkara virkisøki,
- góðar karmar at trívast og mennast innan handilsvinnuna.

Ert tú til reiðar at átaka tær hesa avbjóðing, vilja vit fegin hoyra frá tær. Set nøkur orð saman um teg sjálva/n og send tey innan 1. februar til:

Expert
Tinghúsvegur 42
FO-110 Tórshavn

SMS 35 35 35 **expert** - vit vita www.expert.fo

# Adventistaskúlin

**Innskriving til komandi 1. flokk verður í Adventistaskúlanum hósdagin 24. januar kl. 16:00 – 18:00 í lærarastovuni í nýggja bygninginum. Vinaliga, havi dóps- ella navnaseðil við.**

**Enn eru pláss eftir, sjálvt um tú ikki hevur skrivað teg upp**

**Adventistaskúlin er ein kristin frískúli. Skúlin varð stovnaður í 1966**

**Hetta er nakað av tí, vit leggja dent á:**

- vit hava tryggar umstøður í smáum flokkum
- vit spilla ikki tíðina hjá næmingunum
- vit hava hálvan tíma morgunsang við sangi og søgufrásøgn hvønn morgun
- vit leggja stóran fakligan dent á lesing, skriving og rokning
- vit hava eina fjølbroytta virksemisskrá fyri alt árið
- vit royna at loysa trupulleikar við góðum foreldrasamstarvi
- vit hava góðan stabilitet í lærararmanningini – starvsfólkahópinum

Ynskir tú fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til skúlaleiðaran Janne Schantz Johnsson á tel. 31 32 60 ella 22 50 54

Hoyvíksvegur 56 · FO-100 Tórshavn · Tel. 31 32 60 · sdaskuli@post.olivant.fo

www.skulin.fo/adv

# Catering manning til Smyril

Við hesum verður søkt eftir 8 ¾ tíð størvum til cateringina á Smyril.

Viðkomandi skal byrja umborð á Smyrli, men kann til eina og hvørja tíð verða fluttur, sum fyriskipað av leiðsluni. Arbeiðs- og vaktarskipanin verður fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein verður settur umborð á. Tann, ið settur verður, má kunna byrja beinanvegin vakt hansara er útarbeidd.

**Starvið fevnir um**

Starvið fevnir um alt frá vanligum kafetertia og kioskarbeiði til uppreiðing, reingerðing o.a.

**Førleikakrøv**

- Prógv í nýslu av bjargingarútgerð
- Galdandi heilsuváttan
- Hollur málkunnleika til føroykst,danskt og enskt

Annars vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevnir, dugir at arbeiða sjálvsstøðugt og er fyrikomandi, smílandi og røkin.

**Setanartreytir**

Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjamáláráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**

Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til :

Strandfaraskip Landsins
Sjógøta 5
Post boks 30
Fo-810 Tvøroyri

Og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 30.januar 2008.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jan Haldansen, deildarleiðara, tlf 543041 ella e-post: jah@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 6 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í tríggjar deildir: Samferðslu-, Sjó-, og Fíggjardeild.

STARVSLÝSING

# Handverkari

Vit sóknast eftir einum dugnaligum og álítandi handverkara til smiðjuna á Lambareiði.

**Arbeiðsuppgávur**

Arbeiðið fevnir um viðlíkahald og umvæling av maskinum, bilum o.ø. hjá Landsverki.

**Førleikakrøv**

Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum entreprenørmaskinusmiður, maskinsmiður, bilsmiður, lastbilasmiður ella aðra viðkomandi útbúgving.

**Setanarviðurskifti**

Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmálanum ímillum avvarðandi yrkisfelag og Føroya Handverksmeistarafelag. Starvið er tímalønt.

**Umsóknir**

Umsóknir skulu sendast til:
Landsverk,
Postsmoga 78,
110 Tórshavn,

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 28. januar 2008. Merk brævbjálvan „Umsókn handverkari“ og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Allan Magnussen, smiðjuformann, á tlf. 540 925 ella Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, á tlf. 540 950.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

